5. innleiðandi umfar – Mentanarhúsið í Fuglafirði – leygarkvøldið 8. mars kl. 21.00

## Gestir



**Ólavur Hansen – sang og gittar**
**Torfinnur Jákupsson – gittar**
**Knút H. Eysturstein – ljómborð og sang**
**Niels Jákup í Jógvanstovu – bass**
**Jógvan Andrias á Brúnni – trummur**

Bólkurin varð stovnaður á summri 2002, og síðani hevur hann spælt til onkrar einstakar konsertir. Teir hava spælt í Losjuni í Gøtu, og teir vóru við á Tutl-konsertini í Útvarpshøllinií fjør.

Ein sangur hjá bólkinum er givin út, tað er á live-fløguni hjá Tutl, sum eisini kom út í fjør.

Sangarin og gittarspælarin eru brøður, og teir hava spælt nógv saman. Teir hava tó spælt lítið alment, og tað er ikki fyrr enn nú, at teir rættiliga fáa møguleikan at koma undir sjóneykuna hjá teimum tónleikaáhugaðu.

Gestir spælir alternativan rocktónleik.

## Blív

**Høgni Kragesteen – gittar og kór**
**Ólavur Olsen – sang og trompet**
**Líggjas Olsen – ljómborð og kór**
**Jón McBirnie – bass**
**Rúni Højgaard – trummur**

Sum veruligur bólkur er Blív nýggjur á tónleikapallinum, men onkrir av manningini hava arbeitt við egnum tekstum og tónleiki tey seinastu fimm árini.

Tónleikurin, sum Blív spælir, er pop/rock-tónleikur við einum sermerktum egnum stíli. Allir tekstirnir eru skrivaðir á føroyskum máli, og saman við tónleikinum bera teir á hvør sín hátt ein boðskap út til áhoyrarnar. Stutt og greitt kunnu vit siga, at Blív er ein áheitan í sær sjálvum.

Tekstirnar hja bólkinum hava Hallur Gilstón Thorsteinson, Ólavur Olsen og Høgni Kragesteen skrivað.



## HATESPEECH

**Jákup Pauli Gaard Olsen – sang**
**Hans Marius Ziska – gittar og kór**
**Heðin Ziska Davidsen – gittar**
**Ansgar Jensen – bass**
**Eyðun Djurholm – trummur**

Bólkurin varð stovnaður í 1993. Tá var bólkurin ein kvartett við Jákup Paula, Heðini, Ansgari og Eyðuni. Endamálið var at spæla harðan thrash tónleik, og tað gjørdu teir á ymsum lítlum konsertum og ymsum størri eisini – harímillum Prix Føroyar.

Í 1997 var tíðin komin til, at manningin so smátt fór til Danmarkar at lesa, og tað hevði við sær ein steðg, sum vardi líka til 2002.

Teir hava spælt á konsertum hjá Tutl og á ólavsøkukonsertini í fjør, og nú royna teir seg aftur í Prixnum. Teir vóru við á Prix Føroyum í 1995, har komu teir ikki longur enn til tey innleiðandi umførini. Teir royndu aftur í 1997, og tá náddu teir einum finaluplássi.



## Jam

**Ása Kathy Dam – sang**
**Rúni í Lágabø – gittar og sang**
**Gunnar Olsen – gittar**
**Árni Joensen – bass**
**Búgvi J. Magnussen – trummur**
**Teitur H. Olsen – saxofon**

Bólkurin er nýggjur og er stovnaður sum eitt alternativ til tann harðan rockin, sum tað er nógv av til Prixið. Bólkurin leggur dent á, at hava góðar melodiir til sangirnar hjá sær, og stílurin kann kallast countryrockur.

Ein bólkur, sum tey hava fingið íblástur frá, er amerikanski bólkurin Eagles, og tað er serliga fyrsta tíðarskeiðið hjá bólkinum, sum kanska hoyrist aftur í tónleikinum hjá Jam. Og harafturat hevur bólkurin eisini fingið íblástur frá øðrum bólkum.

Tekstirnir hjá bólkinum eru bæði á føroyskum og enskum máli.



## Týr

**Heri Joensen – gittar og sang.**
**Terji Skibenæs – gittar og sang.**
**Gunnar Thomsen – bass og sang.**
**Kári Streymoy – trummur og sang.**



Bólkurin kom rættiliga fram á Prix Føroyum fyri tveimum árum síðani, tá ið Ormurin Langi rungaði. Fólk tóku sera væl ímóti bólkinum, sum eisini kom í finaluna. Har fingu teir kjansin at spæla á Jelling Festivalinum. Síðani hevur bólkurin gjørt nógv um seg. Hann hevur givið tvær fløgur út, hevur verið á konsertferð ymsastaðni í Norðurlondum og var millum annað eitt heitt navn í Íslandi í farna ári.

Ætlanin er at Týr skal aftur til Íslands at spæla, og teir fara eisini at vera við í danskari tónleikakapping í hesum árinum.

## Zink

**Hans Edward Andreasen – gittar og sang.**
**Heðin Egholm Skov – bass og kór.**
**Heini Mortensen – trummur.**

Søgan um bólkin Zink er stutt. Fyri einum hálvum ári síðani kendu teir ikki hvønn annan. Teir byrjaðu at spæla í oktober, tá ið onkur bara segði: kom og spæli tónleik. Tað gjørdi teir so, men ikki soleiðis, at tað bleiv boyband-venjing 10 dagar um vikuna. Teir venja og hava tað stuttligt saman. Tað hevur størstan týdning.

Bólkurin spælir glaðan skaterpunk, sum mest er undirgrundartónleikur, men sum er vorðin meira viðurkendur seinnu árini. Tónleikurin hjá teimum snýr seg mest um at lýsa keðilig og kanska ræðulig ting, ið fara fram ein vanligan gerandisdag.

Teir hava einaferð spælt alment, tað varð í Studentaskúlanum í Hoydølum.

Annars venja teir á loftinum hjá trummuspælaranum í 50 kuldastigum!






# Bíligari at keypa húsvognar

**Karsten Hansen hevur lagt fyri tingið uppskot um at avtaka avghald á húsvognar, so tað verður eins lagaligt at keypa húsvognar í Føroyum sum í t. d. Danmarki. Eisini verða reglurnar fyri ellisakfør dagførdar**

VEKTGJALD
*Eirikur Lindenskov*



*Aldursásetingin fyri frítøku fyri skrásetingargjaldi á ellisakførum verður lækkað úr 30 árum niður í 25 ár. Hetta verður gjørt eftir ynski frá áhugafelagnum Føroya Ellisakfør, sum metir hetta hava stóran týdning fyri møguleikan hjá limum tess at varðveita gomul akfør í teirra upprunaliga sniði, sigur Karsten Hansen, lands 0stýrismaður í fíggjarmálum. Myndin er tikin á bilstøðini Auto í sekstiárunum*

Gongur sum fíggjarmálaráðharrin vil, so verður tað í framtíðini bíligari hjá føroyingum at keypa sær húsvongar og lagaligari at innflyta ellisakfør.

Seinasta framløgudagin kom á tingborð uppskot frá Karsten Hansen, landsstýrismanni í fíggjarmálum, um broyting í løgtingslóg um skrásetingargjald av motorakførum v. m.

Uppskotið varð av fyrstan tíð lagt fyri tingið seinasta framløgudag í fjør, men tað varð tikið aftur, tí onkur teknisk villa var í uppskotinum.

Talan er um tvær broytingar. Onnur broytingin snýr segum at taka av avgjald á kampingvognar. Hitt snýr seg um at broyta defineringina av ein ellisakfari. Eitt ellisakfar skal eftir uppskotinum verða akfar eldri enn 25 ár. Fyri ellisakfør verður einki skrásetingargjald kravt, men soleiðis sum lógin í løtuni er orðað, verður eitt ellisakfar, bara tá tað verður innflutt, roknað sum akfar eldri enn 30 ár. Tað talan er um vegskatt, verður elliakfar roknað sum akfar, eldri enn 25 ár, og somuleis tá talan er um trygging.

– Hendan broytingin er bæði ein málslig dagføring, har mælt verður til at broyta orðið veteranakfør til ellisakfør, og ein lækking av aldursásetingini fyri frítøku fyri skrásetingargjaldi á ellisakførum úr 30 árum niður í 25 ár, sigur Karsten Hansen.

Hann sigur víðari, at hetta verður gjørt eftir ynski frá áhugafelagnum Føroya Ellisakfør, sum metir hetta hava stóran týdning fyri møguleikan hjá limum tess at varðveita gomul akfør í teirra upprunaliga sniði. Henda broyting viðførir eisini, at sama aldursáseting verður nýtt í øllum lógum viðvíkjandi ellisakførum, tí í løgtingslóg um vektgjald (vegskatt) verður 25 ár nýtt sum aldursáseting fyri ellisakfør. Tað skal viðmerkjast, at Vinnumálaráðið og Bileftirlitið hava viðmælt hesa broyting.

Um broytingina við húsvongum, ella kampingvognum, sum tað eitur í uppskotinum, sigur Karsten Hansen:

– Avgjaldið á kampingvognar er íløtuni 45%. Fíggjarmálastýrið hevur fingið áheitan frá einum áhugabólki um at taka hetta avgjaldið av, tí tað forðar fyri, at kampingvognar verða keyptir til Føroyar. Víst verður á, at í Danmark er einki avgjald. Av tí sama eru tað fleiri føroyingar, sum hava keypt sær ein kampingvogn í Danmark og hava kent seg noyddar at lata teir verða standandi í Danmark fyri at sleppa undan avgjaldinum. Tað skal harafturat viðmerkjast, at einki avgjald er á øðrum viðfestisvognum, og at avgjald longu er rindað fyri bilin, sum togar.

### Avleiðingar av lógaruppskotinum

Lógaruppskotið hevur bert smávegis fíggjarligar avleiðingar fyri landið, tí sum er verða eingir kampingvognar innfluttir. Hinvegin verður tað ein fíggjarligur fyrimunur fyri teir borgarar, sum ynskja at ogna sær ein kampingvogn og fyri møguligar umboðsmenn í Føroyum. Tað er ikki gjørligt at siga, um lækkingin av aldursásetingini fyri frítøku fyri skrásetingargjaldi á ellisakførum fer at hava við sær størri innflutning av ellisakførum, men roknast kann við, at áhugin verður nakað størri.

Lógaruppskotið hevur ikki stórvegis umhvørvisligar avleiðingar við sær, men tað, at aldurin á ellisakførum lækkar, fer at hava við sær, at fleiri akfør koma at koyra á vegunum í Føroyum, men hinvegin verða tey í betri standi. Somuleiðis er møguleiki fyri, at kampingvognar verða meiri sjónligir í nærumhvørvinum.

Uppskotið hevur ongar umsitingarligar avleiðingar við sær ella avleiðingar í mun til altjóða avtalur og reglur, fyri landið, kommunur, ávísar samfelagsbólkar ella vinnuna. Heldur ikki verða sosialar avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar, sigur Karsten Hansen at enda í viðmerkingum til uppskotið.



*Fleiri føroyingar hava keypt sær húsvognar í Danmark, har teir eru skrásettir. Avgjaldsskipanin ger, at tað er rættuliga nógv dýrari at keypa húsvognar í Føroyum, so dýrt, at nærum ein verður keyptur. Hetta vil landsstýrismaðurin nú broyta*

